Barnaverndarstova Føroya

Skeiðsrøð innan

**mentalisering**

í arbeiðinum við børnum, ungum og vaksnum

Hevur tú hug at at fáa tær eina grundleggjandi vitan um mentalisering í verki? Lær um ástøðið, sum mentalisering byggir á og alt tað nýggja, sum fer fram innan økið – eitt nú, hvussu arbeitt verður við sálarløstum innan mentalisering.

Skeiðið er ætlað námsfrøðingum, sosialráðgevum og øðrum, ið arbeiða við børnum, ungum og vaksnum, sum hava verið fyri vansorgan. Eisini er skeiðið ætlað teimum, sum arbeiða við børnum, ungum og vaksnum við sálarligum avbjóðingum.

Skeiðsrøðin er býtt soleiðis upp:

**Mánadagur 19. februar 2018, dagur 1**

*Grundleggjandi hugtøk í mentaliseringsgrundaðari viðgerð. Menning av mentaliseringsførleikum.*

*Undirvísari: Janne Østergaard Hagelquist*

- Innleiðsla í hugtakið mentalisering, soleiðis sum hetta verður brúkt í sambandi við børn, ið hava verið fyri vansorgan, eins og ung og vaksin við diagnosum.
- Mentalisering og mentaliseringssvíkur, innleiðsla í grundleggjandi partar av viðgerðini.
- Menning av mentaliseringsførleikum.
- Arbeitt verður við mentaliseringshugburðinum.

**Týsdagur 20. februar 2018, dagur 2**

*Mentalisering og sálarløstir*

*Undirvísari: Janne Østergaard Hagelquist*

- Ymisk sløg av sálarløstum, søgan hjá hugtakinum *sálarløstur.*
- Sálarløstir og mentalisering, gjøgnumgongd av PTSD diagnosuni við serligum denti á, hvussu vit bera okkum at, tá vit koma í samband við borgarar við hesi diagnosu.
- Sálarløstir í sambandi við menning og tilknýti.
- Arbeiðið við børnum, ungum og vaksnum við sálarløstum – hvørjar grundleggjandi fortreytir skulu vit hugsa um , tá tað snýr seg um sinnisstøðuna hjá viðkomandi, tá ein viðgerðarsamrøða fer fram.

**Mikudagur 21. februar 2018 dagur 3**

*Mentalisering í verki*

- Innleiðsla til bókina *Mentaliseringsguiden* og hvussu hon verður brúkt dag og dagliga, eins og innlit í ástøði og grundleggjandi reglur í mentaliseringsgrundaðari viðgerð av børnum, ungum og vaksnum, sum hava verið fyri vansorgan.
- Undirvísingin ger skeiðsluttakaran føran fyri at velja síni amboð, og at nýta tey í mentaliserandi arbeiðinum saman við børnum ungum og vaksnum – og við hesum knýta tað ástøðiliga og verkliga saman.
- Teir fýra partarnir í bókini verða gjøgnumgingnir:

1. Greining og ástøði, ið snýr seg um teir grundleggjandi *mentaliseringsfrymlarnar*, sum kunnu nýtast til at fáa yvirlit yvir ástøðið, ella nýtast til at greina støðuna hjá einum barni, ungum ella eini familju.
2. Psykoedukatión, sum er sett saman av ymsum frymlum, sum kunnu verða nýttir til at geva teimum, ið hava verið fyri vansorgan, betri fatan av mentalisering og sálarløstum og samstundis eisini av sær sjálvum. Hesir frymlar kunnu nýtast beinleiðis í viðgerðini.
3. Amboð fyri yrkisfólk, sum snúgva seg um umhugsanina hjá sær sjálvum. Í mentaliseringsgrundaðu viðgerðini eru evnini hjá tí yrkislærda at skapa frið í sínum egna sinni - og at vera tilvitandi um sína egnu mentalu støðu – sera umráðandi, so ein munadygg viðgerð kann koma burtur úr.
4. Venjingar, ið nýta ymsar frymlar til mentaliserandi arbeiðið við børnum og ungum. Hesin partur tekur støði í STORM-frymlinum, ið er viðgerðaramboð til tey fimm økini – á donskum: Sikkerhed, Tænk traumer, Opbyg evner, Ressourcer og Mentalisering.

**Hósdagur 3. mai 2016, dagur 4**

*Grundleggjandi ástøði, mentaliseringsgrundað orðing av einum undirvísingardømi og og meginreglur fyri MBT hjá tí einstaka*

*Undirvísari: Nana Nørgaard*

- Grundleggjandi ástøði: Ymisk sløg av præ-mentalisering
- *Mentaliseringpólarnir* i verki: Vanligir spurningar í sambandi við "skeivar" profilar
- Hvussu kunnu vit skilja ymsar diagnosur (angist, tunglyndi, etingarólag, persónleikaólag, sinnissjúkur) í mentaliseringsgrundaðum høpi
- *Interventiónshierark*i og meginreglur fyri MBT-einstakligaviðgerð
- Mentaliserandi hugburðurin – "the mentalizing stance" (framvísingarvideo)
- Mentaliserandi hugburðurin og mentaliseringspólarnir

**Fríggjadagur 4. mai, 20018, dagur 5**

*MBT viðgerð hjá tí einstaka: Gjøgnumgongd av vegleiðing og venjingar*

*Undirvísari: Nana Nørgaard*

- Ymisk sløg av præ-mentalisering verða viðgjørd: hvussu handfara vit *teleologiskan modus*, *sálarligan ækvivalens* og *pretend modus* (framvísingarvideo)
- Hvussu stimbra vit mentalisering?
- Samanumtøka og hugleiðingar um skeiðið.

Kostnaðurin fyri allar 5 skeiðsdagarnar, ið verða hildnir kl. 9.00 – 15.30 í hølunum hjá Starvsmannafelagnum í Tórshavn, er 5.000 krónur, og luttakararnir fáa skeiðsváttan eftir lokið skeið. Tey, sum fyrr hava verið á skeið hjá Janne Østergaard Hagelquist í mentalisering, hava møguleika bert at tekna seg til dagarnir 4 og 5 við Nanu Nørgaard fyri 2.000 krónur.

Áhugaði verða biðin um at melda seg til skeiðini hjá armgard@kf.fo innan **9. februar 2018**. Tilmeldingin er bindandi.

*Um teir báðar undirvísararnar:*

**Janne Østergaard Hagelquist** er góðkendur sálarfrøðingur og serfrøðingur í barnasálarfrøði og supervisjón. Hon hevur í nógv ár arbeitt við viðgerð av børnum, ungum og familjum, sum hava verið fyri vansorgan, ágangi og øðrum harðskapi. Eisini hevur hon royndir við at veita supervisjón og undirvísa starvsfólki, ið arbeiða við børnum og ungum, ið hava verið fyri vansorgan, eins og og foreldrum teirra. Í 2012 gav hon út bókina ”Mentalisering i mødet med udsatte børn og unge”, og í 2013 skrivaði hon saman við øðrum bókina ”Døgninstitutionspædagogik”. Á vári 2014 kom so bókin ”Mentalisering i pædagogik og terapi”, í 2015 “Mentaliseringsguiden”, í 2016 “Mentalisering i organisationen” og í 2017 “Mentalisering i familien”

**Nana Lund Nørgård** er góðkendur sálarfrøðingur og hevur drúgvar royndir innan sálarfrøðiligu viðgerðarskipanina við mentaliseringsgrundaðari viðgerð av persónleikaólagi. Nana hevur fingið eftirútbúgving í mentaliseringsgrundaðari viðgerð á Institut for mentalisering í Oslo, har hon eisini undirvísir. Hon hevur síðani 2011 starvast á Psykoterapeutisk Center Stolpegård (PCS), Ambulatorium for Personlighedsforstyrrelser, har hon viðger vaksin við persónleikaólagi, ofta við sálarløsti í sambandi við tilknýti, ella samansett PTSD.